




Puntur nr.19

# Perlan á suðurendanum

**Suðurendin av Hetlandi er ein sonn náttúruperla. Lomvigi, lundar og súlur í túsundatali eru bert metrar frá ferðafólkinum, og er hepni við, kann onkur stórhvalurin eisini síggjast**

HETLAND
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Suðurendin av Hetlandi – skamt frá flogvøllinum – er ein sonn náttúruperla*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Vit føroyingar breggja okkum ofta av at hava okkurt petti av heimsins vakrastu náttúru. Sjálvt ein sumbingur, sum er vanur at líta á útsýnið við Beinisvørð, fær tó neyvan mótmælt pástandinum um, at hetlendska svarið upp á Sumba – Sumburgh – bjóðar eina eins stórsligna sjón, sum forbergið við suðurenda okkara.

## Friðaðir fuglar og stórhvalir

Hóast hæddin av útsýninum kanska ikki er eins ørandi, so er talan ein góðveðursdag um framúr vakurt útsýni. Ikki minst er talan um eitt mest sum ófatiliga ríkt fuglalív, har túsundtals lundar, lomvigar, skarvar og súlur búgva lið um lið á steyrrættu líðunum, sum liggja skamt frá flogvøllinum á oynni.

Eins og føroyingar, so hava hetlendingar í síni tíð tikið hópin av fugli, men tann siðvenjan er nú deyð. Fyri einum 30 árum síðani varð gjørt av, at alt fuglalív á oynnum skuldi friðast, og í dag er als ikki vanligt, at hetlendingar yvir høvur vita, hvussu fuglur smakkar. Men kemur tú í prát við onkran av teimum, sum uppvaksin uttan fyri Lerwick, vita hesi tó helst at siga fleiri spennandi rættir, sum tey í síni tíð hava roynt.

Yvir havið – har Norröna eisini sæst sigla hvørja viku summarhálvuna – er talan eisini um frálíkt útsýni, og her hevur Hetland nakað, sum Føroyar sjáldan kunnu bjóða ferðafólki. Frá til endamálið uppsettu kikarunum, ber til at leita eftir fleiri sløg av stórhvalum, og eins og ríka fuglalívið, so kann talan so sanniliga eisini vera um stórsligna sjón. Ikki minst, um tú ert so heppin, at ein bólkur av kúlubøkum hevur lagt leiðina framvið Hetlandi.

## Fínar bilferðir

Og so er tað eisini stutta fjarstøðan. Ferðast tú í Hetlandi, so er skjótt at koma úr stað í stað. Úr enda í annan er ikki meira enn góður tími at ferðast við róligari ferð, og tí nýtist tær ikki endiliga at hugsa so nógv um, akkurát hvar í landinum gist verður. Verður ferðast í bili, ber altíð til at finna eina góðveðursløtu, og tað er so sanniliga ikki bara suðurendin, sum er vakur.

Verður koyrt norðureftir er náttúran til tíðar heldur kargari, enn hon er tað í Sumburgh, men á sín hátt er hon fult so vøkur her, sum nakra aðrastaðni á oynnum. Tí er einki at ivast í, at ein bilur – um hann so er egin ella leigaður – avgjørt er ein fyrimunur, tá ferðast verður á grannaoyggjum okkara. Hóast mjørki og regn eisini her hava hug at arga, so geva mongu góðveðursdagarnir høvi til nakrar fínar bilferðir, sum leingi verða standandi í minninum hjá tí ferðandi.



*Ófatiliga ríka fuglalívið er úrslit av, at hetlendingar nú í eini 30 ár hava bannað allari veiðu eftir fugli. Her sita lomvigarnir tættir*

*Mynd: Jens Kr. Vang*




